

*Eisini Hanus G. Johansen hevði sína fyrstu framførslu nakrantíð á Planet. Sum altíð, tá hann fer á pall, dró hann áhoyrararnar við sær.*



*Anna Faroe, sum var tilnevnd til tríggjar planetir, kom úr Danmark og hevði eina fantastiska framførslu við trimum løgum í Deep.*

# Fingu tað fremsta av tí føroyska

**Planet Awards hevði eitt sindur av øllum. Livandi legendur, fantastiskar songkvinnur og tað besta av tí nýggjasta á føroyska tónleikapallinum**

**Rólant Waag Dam**

Føroyski tónleikapallurin hevur nógv at bjóða og tað sást sanniliga aftur á ársins Planet Awards í Deep í Havn. Livandi legandan Hanus G. Johansen, sum varð tilnevndur til tvær Planetir, hugtók við løgum at frálíku fløgu hansara Hørpuspælarin. Eivør, eisini tilnevnd til tvær Planetir, gandaði og spældi løg av fløguni Larva, sum kortini ikki vann. Anna Faroe og Lív Næs staðfestu við sínum framførslum, hví tær vóru tilnevndar at vera Ársins songkvinnur.

Tað sama gjørdu Eyðun & Kim, sum vóru tilnevndir fyri at hava gjørt Ársins sang, tá teir framførdu vakra og fangandi poppsangin Far so væl. Jens Marni Hansen var bæði tilnevndur og vann eisini heiðurin sum Ársins sangari. Fremsta orsøkin var ivaleyst sangurin Gloria, sum kollfirðingurin eisini sang so tað rungaði í stóru hølunum í klubbagarðinum.

Og so fekk fólkið eisini Ársins sang fyri seinastu ferð í 2010. Kjallarabólkurin úr Klaksvík, Grandma's Basement, fær ikki nokk av at spæla Hon fær ongantíð nokk.

Fólkið fekk føroyskan tónleik og fólkið fekk tað besta av tí besta av tí føroyska.

rolant@sosialurin.fo

Myndir: Álvur Haraldsen



*Eyðun, Kim og James, sum hava verið stór nøvn í føroyskum tónleiki í mong áratíggju, framførdu tvey løg.*



*Eivør hevði sína fyrstu framførslu á Planet. Við sínum guittara og síni bergtakandi rødd sang hon tvey løg av nýggju fløguni Larva.*



*Grandmas Basement, sum er ungi, sprelski klaksvíksbólkurin, framførdu ársins sang: Hon fær ongantíð nokk.*